LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 23. oktober 2014
J.Nr.: LUM-80- 14/00069-10
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**
viðvíkjandi klagu um at Mentamálaráðið hevur sýtt innlit í lóggávumál

Við skrivi, dagfest 7. august 2014, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Eg sendi hervið eina klagu um vantandi *innlit* (*mín viðm.*) frá Mentamálaráðnum í nøkur hoyringarsvør.
>
> Eg bað 4. august 2014 Mentamálaráðið um innlit í uppskot til løgtingslóg um Søvn Landsins, sum var sent til hoyringar 20. januar í ár. Eg bað eisini um innlit í hoyringarsvørini til hetta lógaruppskot.
>
> Eg fekk innlit í lógaruppskotið, men eg fekk ikki innlit í hoyringarsvørini við tí grundgeving, at "arbeitt verður í løtuni við málunum og vísandi til § 2, stk. 2, verður alment innlit ikki givið í málini – innanhýsis skjøl og hoyringarsvør, tí talan er um lóggávumál, sum ikki eru framløgd í Løgtinginum enn".
>
> Eg vil hervið klaga um, at alment innlit ikki verður givið í hoyringarsvørini. Eg meti, at innlit átti at verið givið í hoyringarsvørini, tí talan er um skjøl, sum eru send millum almennar stovnar.
>
> Telduposturin við svarinum uppá innlitsumbønina sæst niðanfyri, og lógaruppskotið er viðheft hesum teldupostinum."

**Málsgongd**
Tann 4. august 2014 sendi A Mentamálaráðnum soljóðandi umbøn:

> "Eg vil hervið biðja um innlit í hoyringarsvørini til lógaruppskotið um Søvn Landsins, sum var til hoyringar fyrr í ár.
>
> Eisini vil eg biðja um innlit í lógaruppskotið um Søvn Landsins."

Tann 6. august 2014 svaraði Mentamálaráðið A:

> "Vísandi til niðanfyristandandi umbøn tygara um alment innlit verður kunnað um, at viðheftu uppskot sum kunnugt vóru send út til hoyringar 20. januar 2014 og vóru eisini løgd á heimasíðu Mentamálaráðsins til viðmerkingar, so hesi eru longu almenn.
>
> Arbeitt verður tó í løtuni við málunum og, vísandi til § 2, stk. 2, verður alment innlit ikki givið í málini – innanhýsis skjøl og hoyringarsvør, tí talan er um lóggávumál, sum ikki eru framløgd í Løgtinginum enn."

Umboðsmaðurin hevur tann 26. august 2014 fingið øll skjølini í málinum til láns frá Mentamálaráðnum. Av skjølunum sæst, at lógaruppskot til løgtingslóg um Søvn Landsins og lógaruppskot um broytingar í ymiskum løgtingslógum á savnsøkinum tann 14. januar 2014 vóru send til undanhoyring hjá deildarleiðarunum á Søvnum Landsins og hjá Fornminnisnevndini og tann 20. januar 2014 vóru send út í hoyring. Hoyringarfreistin var úti tann 3. februar 2014.

Tann 4. februar 2014 skrivaði Mentamálaráðið upprit, har ført varð fram, at hoyringarsvørini áttu at verið viðgjørd saman við hoyringarpørtunum. Mælt varð tí til at útseta framløguna av lógaruppskotunum og í staðin fyrireika eina samlaða endurskoðan av lóggávuni á savnsøkinum til eftirfylgjandi tingsetu.

Tann 24. februar 2014 sendi Mentamálaráðið skriv til hoyringarpartarnar um, at ráðið hevði tikið avgerð um at arbeiða víðari við lógaruppskotunum og leggja tey fyri Løgtingið í eftirfylgjandi tingsetu.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 11. august 2014, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 26. august 2014 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "...
>
> **Løgfrøðilig lýsing av galdandi rætti á økinum**
>
> Hoyringarsvar við tøttum tilknýti til eitt ítøkiligt lógaruppskot er at meta sum partur av einum ítøkiligum lógarfyrireikandi arbeiði og harvið fevnt av hugtakinum "lóggávumál", sbr. § 2, stk. 2 í innlitslógini, FOB 1992.53, FOB 1999.323 og Steen Rønsholdt í Forvaltningsret – Retssikkerhed, proces, sagsbehandling, 2. udgave (2006), forlaget Thomson, s. 326.
>
> Atlitið handan ásetingina í § 2, stk. 2 í innlitslógini er at tryggja umsitingini arbeiðsfrið í sambandi við ítøkilig lóggávumál og við atliti til at tryggja fyrisitingini møguleika at samstarva við fólk, uttan at hesi skulu kenna seg trýst av, at viðmerkingar teirra, - ið ofta bera brá av at vera av meiri fyribils slagi – verða almennar. Hetta kann bera við sær, at fólk aftra seg við at gera sínar viðmerkingar til eitt lógaruppskot, ið annars eru av sera stórum týdningi fyri lóggávumál, sbr. pkt. 7.3.2.1. í Betænkning om offentlighedsloven nr. 1510/2009.

> **Meting Mentamálaráðsins**
>
> Lógaruppskotini, sum løgd vóru út á heimasíðu Mentamálaráðsins til almenna hoyring, eru at rokna sum útkast til ítøkiliga lógarfyrireiking.
>
> Viðvíkjandi spurninginum um meirinnlit sbrt. § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini hevur Mentamálaráðið í fyrra lagi mett, at hesin spurningur er treytaður av, at talan er um eitt mál fevnt av innlitslógini, sum lóggávumál ikki eru, sbr. § 2, stk. 2 í innlitslógini.
>
> ...
>
> **Niðurstøða**
>
> Vísandi til omanfyristandandi metir Mentamálaráðið ikki, at klagarin hevur rætt til innlit í nevndu skjøl.
>
> ..."

Tann 9. september 2014 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at ikki var neyðugt við framhaldandi partshoyringum, og at farið varð undir endaligu viðgerðina av málinum.

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um, hvørt klagarin hevur rætt til at fáa innlit í hoyringarsvør í sambandi við eitt lóggávumál, og hvørt myndugleikin hevur skyldu til at umhugsa at geva meirinnlit í sambandi við lóggávumál.

*Innlit í hoyringarsvør til lóggávumál*
Málið, ið klagarin ynskir innlit í, eru hoyringarsvør til løgtingslóg um Søvn Landsins og til broytingar í ymiskum løgtingslógum á savnsøkinum. Av tí at lógaruppskotini longu hava ligið alment frammi, snýr málið seg um rættin til innlit í hoyringarsvørini til lógaruppskotini.

Sambært § 2, stk. 2 í innlitslógini eru lóggávumál, herundir játtanarlógir, bert fevnd av lógini, tá lógaruppskotið er lagt fram í Løgtinginum.

Klagarin sigur í klagu sínari, at innlit átti at verið givið í hoyringarsvørini, tí talan er um skjøl, sum eru send millum almennar stovnar.

Til hetta er at siga, at álit, frágreiðingar og ummæli frá serfrøðingabólkum, áhugafeløgum o.s.fr., sum eru fingin til vega í sambandi við eitt lóggávumál, eru fevnd av hugtakinum "lóggávumál" í § 2, stk. 2 í innlitslógini. Hesin spurningur verður eisini umrøddur í í FOB 1991.47, har sagt verður:

> "Jeg henviser i den forbindelse også til motiverne til offentlighedslovens § 2, stk. 2, hvor der som eksempler på, hvilke dokumenter der omfattes af bestemmelsen - altså indgår i en sag om lovgivning - er nævnt "udtalelser fra organisationer og fra underordnede myndigheder og institutioner" samt "betænkninger eller redegørelser fra sagkyndige udvalg, arbejdsgrupper mv., der har fået til opgave at tage stilling til lovgivningsspørgsmål."

Lóggávumálið, sum klagan snýr seg um, varð ikki lagt fyri Løgtingið. Mentamálaráðið hevur í staðin valt at fyrireika eina samlaða endurskoðan av lóggávuni á savnsøkinum til eina seinnu tingsetu.

Lóggávumál, sum ikki verða løgd fyri Løgtingið, eru ikki fevnd av almennum innliti, sbrt. § 2, stk. 2 í innlitslógini, sbr. eisini LUM 200800054. Hoyringarsvørini frá serkønum, ráðum, stovnum o.ø., sum eru komin til upprunaligu lógaruppskotini, hava so tætt tilknýti til upprunaligu lógaruppskotini, at eisini tey eru fevnd av hugtakinum "lóggávumál".

Eg eri tí samd við Mentamálaráðnum í, at hoyringarsvørini til lógaruppskotið til løgtingslóg um Søvn Landsins og lógaruppskotið um broytingar í ymiskum løgtingslógum á savnsøkinum eru ein partur av lóggávumálinum, sum ikki er fevnt av almennum innliti, sbrt. § 2, stk. 2 í innlitslógini.

*Skylda at umhugsa meirinnlit*
Lógin um innlit í fyrisitingina tekur bert støðu til spurningin um, í hvønn mun fyrisitingin hevur skyldu til at geva innlit. Meginreglan er tó, at tann einstaki myndugleikin eisini skal umhugsa, um innlit kann gevast í størri mun enn ásett í lógini, um hetta ikki er í stríð við aðrar ásetingarnar so sum ásetingar um tagnarskyldu v.m.

Tá lóggávumál, sum enn ikki eru løgd fyri Løgtingið, ikki eru fevnd av innlitslógini, hevur myndugleikin ikki skyldu til at umhugsa at geva meirinnlit. Tó kann fyrisitingin av sínum eintingum geva meirinnlit í lóggávumál.

*Samanumtikið*
Samanumtikið meti eg, at klagarin ikki hevur rætt til innlit í hoyringarsvørini til lógaruppskotið til løgtingslóg um Søvn Landsins og lógaruppskotið um broytingar í ymiskum løgtingslógum á savnsøkinum. Sambært verandi rættarstøðu kann Mentamálaráðið tó umhugsa at geva meirinnlit í hoyringarsvørini, men hevur ikki skyldu til hetta.

Burtursæð frá omanfyri nevndu viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður